


Hans J. Hermansen, Sp/f Koyrikortið:

# Málið er ein koyri-tøknilig miðstøð



*Hans J. Hermansen eigur og rekur Sp/f Koyrikortið, sum arbeiðir fram ímoti eini fullfíggjaðari koyritøkniligari miðstøð fyri allan flutning*

Sp/f Koyrikortið varð stovnað í 1995 av Hans J. Hermansen í Havn. Fyritøkan arbeiðir fram ímóti eini fullfíggjaðari koyritøkniligari miðstøð fyri allan flutning við t.d. hálkubreyt við grulvigarði, sum er eitt afturlatið øki, har næmingarnir trygt kunnu læra seg at koyra.

Endamálið er, at tú kanst fáa alla útbúgving viðvíkjandi koyrifrálæru í Føroyum

Sum er fært tú koyrikort til motorsúkklu, persónbil, lastbil, trailara, buss og hestaflutning. Skúlin veitir eisini vinnulig koyrikort til persónbil, buss og krana og gevur loyvi til trukk.

Arbeitt verður fram ímóti at kunna lata koyrikort til stórar kranar og til koyring við vandamiklum evnum.

Seks fólk eru í dag knýtt at fyritøkuni, sum heldur til í Slættanesgøtu 5.




Fa. Billutir, Kollafjørður:

# Kundin sparir 50 prosent ella meira

**Fa. Billutir í Kollafirði, sum selur allar eykalutir til bilar, hava fleiri ferðir skipað fyri kunningartúrum uttanlands saman við sínum kundum. Fríggjadagin 23. apríl fór eitt ferðalag til Danmarkar, har teir m. a. vitjaðu ein av størstu bilupphøggarunum har**

BILUPPHØGG
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Fa. Billutir*

Endamálið við ferðini var at fylgja mannagongdini frá tí at ein bilur kemur til upphøggingar, til hann so at siga liggur á hillunum, serliga við atliti til umhvørvisvernd, sigur Petur Martin Johansen frá Fa. Billutir, ið var ferðaleiðari á túrinum.

Í Danmark eru yvir 100 ymiskir bilupphøggarar og sera strong umhvørviskrøv verða sett til teir, tá bilarnir verða høgdir upp, serliga viðvíkjandi bensin, olju, bremsivesku, akkumulatorum o.l. Tá t. d. airbag-skipanir verða tiknar úr bilunum, verða lutirnar av trygdarorsøkum goymdar í avlæstum rúmum.

Føroyska ferðalagið vitjaði Midtjysk Autoophug í Ikast og bleiv væl kunnað um hvussu upphøggarar arbeiða. Umleið 50 danskir upphøggarar eru við í felags telduskipanini, Autoophuggernes Datalager, har teir kunnu síggja hvat aðrir hava á goymslu. Endamálið við hesi skipan er, at um ein upphøggari ikki hevur ein ávísan eykalut, sum kundin spyr eftir, kann hann beinanvegin síggja um onkur annar upphøggari hevur eykalutin og soleiðis hjálpa kundanum.



*Vitjan á Midtjysk Autoophug, sum eru limir í Autoophuggernes Datalager. Aftara rað f.v. Judy Thomsen, eigar av fyritøkuni, og Kristian Knudsen, leiðari, Jakku Guttesen, frá Bilasøluni v.Øssur Johannesen, Otto Andreasen, frá P/F Meinhardt Arge, Magnus Magnussen, frá El-Mek, Tummas Vilhelm, frá P/F Meinhardt Arge, John Hendrik Poulsen, frá Bil-Maskinverkstaðnum á Sandi, Dánjal Jákup Joensen, frá Bilverkstaðnum v.John Heinesen, Paw Kristensen, frá Midtjysk Autoophug, og Karl Sofus Heimistovu, frá Bilbon í Klaksvík. Fremra rað f.v. Magni Djurhuus, frá Berg Motors, Tórmóður Dalsgaard, frá Bil-Maskinverkstaðnum á Sandi, Petur Martin Johansen og Sune Berglind, frá Fa. Billutir*

Midtjysk Autoophug A/S í Ikast er ein av størstu upphøggarum av bilum í Danmark. 25 starvsfólk eru í fyritøkuni, sum eisini hevur eina deild í Holstebro. Teir levera brúktar eykalutir til øll bilmerkir. Fyritøkan er ISO 14001 góðkend, sum bleiv eitt lógarkrav 1. juli 2000.

Petur Martin Johansen, frá Fa. Billutum, sigur, at størsti fyrimunurin við at keypa frá upphøggarum er prísurin, kundin kann spara upp til 50 prosent, ella meira av hvat ein nýggjur eykalutur kostar.

Við í føroyska ferðalagnum vóru 10 mans frá ymiskum føroyskum fyritøkum, sum eisini royndu seg sum go-kart koyrar og vóru túrar við sveimflogfari.



*Petur Martin Johansen, stjóri í firma Billutum í Kollafirði á veg upp at sveima í sveimiflogfari í Jyllandi*



*Ein Nissan Micra á veg til upphøggingar á Midtjysk Autoophug í Ikast*



*Midtjysk Autoophug í Ikast er ein av størstu upphøggarum av bilum í Danmark*